## Atli og teir vunnu



Danska 1. deildarliðið Frem spældi um vikuskiftið venjingardyst ímóti SønderjydskE á útivølli. Dysturin endaði nakað óvænta við, at Frem vann dystin 3-2. Atli Danielsen byrjaði dystin á miðvøllinum, men hann varð skiftur út í hálvleikinum, tá ið fleiri útskiftingar vórðu gjørdar. Atli kom inn aftur smáar 20 minuttir fyri tíð, og spældi seinasta partin av dystinum, tá ið Frem skoraði sigursmálið.

## Mourinho og Abramovich slætta sjógv

Roman Abramovich, eigari av enska felagnum Chelsea, og venjarin Jose Mourinho hava ikki sitið væl um sátt seinasta árið. Nú skulu teir báðir hava slættað sjógvin á einum fundi, sum varð hildin um vikuskiftið. Fleiri ferðir hava tíðindi gingið í enskum miðlum um, at Mourinho fór at fáa sekkin, men hetta er ikki blivið til nakað, og tað verður framvegis tann framligi portugisiski venjarin, sum skal standa á odda fyri Chelsea í næsta kappingarári.

# Torkil vann í Sørvági

**FM-kappróður**

| | 5-mannafør, dreingir | Stig íalt |
|---|---|---|
| 1 | Havfrúgvin | 38 |
| 2 | Sílið | 32 |
| 3 | Teistin | 20 |
| 4 | Tjaldrið | 14 |
| 5 | Jallurin | 11 |
| 6 | Junkarin | 9 |
| 7 | Jomfrúgvin | 3 |
| 8 | Blikur | 3 |
| 9 | Drekin | 2 |
| | **6-mannafør, kvinnur** | |
| 1 | Jarnbardur | 42 |
| 2 | Kollfirðingur | 28 |
| 3 | Lómur | 18 |
| 4 | Smyril | 8 |
| 5 | Hvessingur | 2 |
| | **5-mannafør, gentur** | |
| 1 | Hvassi | 40 |
| 2 | Tambar | 28 |
| 3 | Drekin | 28 |
| 4 | Ørnin | 15 |
| 5 | Blikur | 13 |
| 6 | Teistin | 8 |
| | **5-mannafør, kvinnur** | |
| 1 | Sílið | 35 |
| 2 | Ørnin | 28 |
| 3 | Fípan Fagra | 25 |
| 4 | Frúgvin | 22 |
| 5 | Ritan | 12 |
| 6 | Teistin | 9 |
| 7 | Jallurin | 1 |
| | **6-mannafør, menn** | |
| 1 | Sundabáturin | 40 |
| 2 | Tvørabáturin | 30 |
| 3 | Strálan | 26 |
| 4 | Jarnbardur | 17 |
| 5 | Lómur | 7 |
| 6 | Riddarin | 5 |
| 7 | Sølmundur | 5 |
| 8 | Rádni | 2 |
| | **8-mannafør** | |
| 1 | Heiðabáturin | 42 |
| 2 | Argjabáturin | 29 |
| 3 | Ørvur | 21 |
| 4 | Árnfirðingur | 20 |
| 5 | Knørrur | 14 |
| | **10-mannafør** | |
| 1 | Eysturoyingur | 42 |
| 2 | Vestmenningur | 30 |
| 3 | Havnarbáturin | 12 |



*Áhugin hjá yngru súkklarunum at taka lut var heilt stórur, tá skipað varð fyri vestanstevnusúkkling*

*Mynd: Álvur*

**Torkil Veyhe var fremstur av teimum vaksnu, tá súkklað varð um kapp á vestanstevnu í Sørvági**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longu undan kappróðinum fóru bæði børn og vaksin undir kappingina. Byrjað varð við Kirkjuna, og síðani varð súkklað móti Bø, áðrenn kósin aftur varð sett heimaftur.

Hugaligt var at síggja, at luttøkan til yngru bólkarnar var heilt góð. Til samans kappaðust 17 dreingir í dreingjabólkunum, meðan tríggjar gentur tóku lut í gentubólkunum.

Hjá teimum vaksnu, sum súkklaðu einkultstart, vóru bara tveir luttakarar. Nakað sum ivaleyst var ávirkað av, at alt ferðalagið hjá súkklulandsliðnum enn ikki er komið aftur av Rhodos. Men við nærum tveimum minuttum aftur til Eli Christiansen prógvaði Torkil Veyhe enn einaferð, hvussu sterkur hann er á einkultstartinum.

Hjá teimum vaksnu verður næsta kappingin Statoil Kring Føroyar, sum byrjar mikukvøldið.

**Úrslit á vestanstevnu**

| Nr. | Navn | Bústaður | Tíð |
|---|---|---|---|
| | **Gentur yngri enn 8 ár, 2 km** | | |
| 1 | Heidi Joensen | Miðvági | 7,27 |
| | **Dreingir yngri enn 8 ár, 2 km** | | |
| 1 | Tummas Simonsen | Tórshavn | 5,31 |
| 2 | Bartal Dam Gregoriusen | Argjum | +0,46 |
| 3 | Hákun Poulsen | Argjum | + 0,57 |
| 4 | Mattias Jacobsen | Miðvági | + 1,15 |
| 5 | Arne Tausen | Miðvági | + 1,16 |
| 6 | Árni Hansen | Miðvági | + 1,27 |
| 7 | Bárður Heðinsson | Sørvági | + 1,43 |
| | **Gentur 9-11 ár, 4 km** | | |
| 1 | Hildur Poulsen | Argir | 12,45 |
| 2 | Henrikka Samuelsen | Miðvági | + 0,52 |
| | **Dreingir 9-11 ár, 4 km** | | |
| 1 | Niels Gilstein Midjord | Tórshavn | 9,21 |
| 2 | Tóri Nielsen | Sandavági | + 0,12 |
| 3 | Magnus Heinason Eysturoy | Tórshavn | + 1,28 |
| 4 | Hjørtur B. Poulsen | Tórshavn | + 2,06 |
| 5 | Hallur Jørgensen | Sørvági | + 2,11 |
| 6 | Bjarni Skála | Argir | + 2.15 |
| 7 | Maks Västhav | Svøríki | + 2,43 |
| | **Dreingir 12-14 ár, 6 km** | | |
| 1 | Benjamin Thomassen | Kollafirði | 13,23 |
| 2 | Jóanis Albert Nielsen | Sandavági | + 1,07 |
| 3 | Andreas Olsen | Danmark | + 4,39 |
| | **Vaksin menn, 33 km** | | |
| 1 | Torkil Veyhe | Tórshavn | 50,56 |
| 2 | Eli J. Christiansen | Tórshavn | + 1,50 |